# Stórarbeiði umborð á Ennibergi

**Verksmiðjan á Ennibergi verður bygd út og gjørd arbeiðsligari. Nýggj skiljilinja og vaskikør verða sett upp, eins og frystiorkan verður tvífaldað**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

**Enniberg - Runavík:** Verksmiðjan á Ennibergi verður sum nýggj. Hóast ikki verður skift út, verður nýtt sett afturat, og sumt vent við, so nógv arbeiðsligari verður umborð.

Tað sær út sum eitt byggipláss, og tað er tað eisini. Á bryggjuni niður við skipssíðuni liggja dungar av tilfari, sum tikið er úr skipinum og skal beinast burtur. Sama lagið er á dekkinum, og niðri á verksmiðjudekkinum er mest at kalla hurlivasi.

Tað hanga leys rør ymsastaðni. Menn ganga aftur og fram og eru upptikinir av ymsum. Tað standa ymisk nøvn á rygginum á ketildraktunum, so líkt er til, at her eru fleiri smiðjur í gongd.



*Klæmint Sólsker er sjalvur annar kokkur við Ennibergi. Teir skiftast um at vera umborð, meðan arbeitt verður við verksmiðjuni*

*Mynd: Edvard Joensen*

### Kokkurin

Smiðirnir greiða frá, at kokkurin gongur uppi í galluni. Hann er við at rigga av eftir døgurðan, siga teir.

Tá vit koma uppá, er hann liðugur við avruddingina, men liggur á knæ í gongini og leggur papp eftir dúrkinum. Her skal ikki dálkast nakað. Og tað sæst eisini, at skipið er væl hildið.

Klæmint Sólsker er kokkur i dag. Teir eru tveir kokkar við, og meðan skipið hevur ligið á Runavík, hava teir upp á skift verið umborð og gjørt mat til arbeiðsfólkið.

– Tað eru umleið 40 mans til døgurða hvønn dag, og nakað færri koma til nátturða, greiðir kokkurin frá.

Hendan skipanin roynist væl, sigur hann, og heldur, at arbeiðsfólkinum eisini dámar hana væl, tí tað er nógv lættari hjá teimum at hava alt á einum stað. Arbeitt verður frá morgninum til nakað væl ut á kvøldið.

Tað hydrauliska, sum gjørt verður umborð, ger fólk frá Oilwind í Miðvági, og teir menninir búgva fast umborð. Teir koma mánamorgun og verða so fyri vikuna, greiðir Klæmint frá.

### Nýggj útgerð

Tað verður í grundini einki skift út umborð, sigur Mortan Johannesen, reiðari. Men ymiskt verður sett í afturat, sigur hann.

Eitt nú er nýggj skiljilinja, sum flokkar fløkini, keypt frá Marel í Íslandi, sum verður sett upp í samráð við Formula.fo.

Eisini eru nýggj vaksikør keypt úr Íslandi og verða sett upp, soleiðis at fiskurin nú verður reinari, áðrenn hann verður skorin, tí hann sleppur at bløða betri.

Ein bitamaskina verður sett upp. Hon fer at skera fløkini i smærri bitar, alt eftir, hvat marknaðurin vil hava.

Tað ger so aftur, at frystiorkan má økjast, sigur Mortan Johannesen. Hon verður nú umleið tað dupulta av tí, hon var frammanundan.

FJM í Runavík stendur fyri smiðjuarbeiðinum, meðan Oilwind í Miðvági ger tað hydrauliska.

Enniberg hevur ligið á Runavík einar tveir mánaðar, men reiðarin roknar við, at teir sleppa avstað seinast í næstu viku.

Mortan Johannesen hevur ongan hug at tosa um prís fyri arbeiðið umborð á Ennibergi annað enn, at tað er dýrt.

### Fiskiskapurin

Enniberg fer eystur eftir, nú farið verður aftur til fiskiskap. Væntandi verður hann í Brentshavinum, til farið verður at fiska kongafisk í Irmingarhavinum einaferð um hálvan apríl, sigur Mortan Johannesen.

Mortan Johannesen eigur eisini Ljósafelli, sum í løtini er á Flemish Cap og roynir eftir svartkalva.

Men har gongur einki soleiðis, sum er, sigur reiðarin. Illveður hevur verið seinastu dagarnar, og Ljósafelli lá bakk stóran part av seinastu viku og eisini fleiri dagar hesa vikuna.

*Tað sæst á bryggjuni, at stórarbeiði fer fram umborð á Ennibergi*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Fríðka bygdina

**Skopunar Kommuna er farin undir at fríðka bygdina, eins og ferðsluumlegging verður gjørd á havnarlagnum**

KOMMUNALMÁL
*Edvard Joensen*

**Skopun:** Tað skal gerast meira innbjóðandi hjá fólki at koma til almennu stovnarnar í Skopun. Kommunan er farin undir at gera torg í bygdini.

Tað standa eini brún hus nakað ovarlaga í Skopuna. Við tveimum skeltum á. Tey vísa, at Postverkið og Toll- og Skattstovan húsast her. Einastu almennu stovnar, sum eru í Skopun.

– Tað eru tveir almennir stovnar í bygdini, og teir skulu hava góðar umstøður, sigur borgarstjórin.

Gerhard Lognberg, borgarstjóri, sigur, at bygdarráðið hevur ásannað, at umhvørvið rundan um hevur ikki verið nóg innbjóðandi hjá fólki at komið til, og tí hevur kommunan gjørt av at fríðka um plássið.

Eini gomul hús, sum hava verið grannar hjá posthúsinum, hevur kommunan keypt og tikið niður, eins og ein gomul kiosk, sum ikki hevur sæð nakað út soleiðis í seinastu, fær somu lagnu.

Økið, sum nú verður ruddað, verður so gjørt til eitt torg, sigur borgarstjórin.

Arbeitt verður eisini við at leggja ferðsluna til og frá ferjuleguni um, soleiðis at øll ferðslan verður beind burtur av bryggjuni, har hon nú er.

Gerhard Lognberg greiðir frá, at ætlanin er at leggja vegin niðan fyri brimgarðin eftir tí stóra økinum, gjørt er har. Síðan verður bryggjan helst bara stongd av, so eingin bilferðsla verður eftir henni yvirhøvur. Heldur ikki frá Teistanum og niðan í bygdina.



*Skopunar Kommuna ger torg framman fyri Posthusinum og Tollstovuni, sum halda til í húsunum til vinstru í myndini*

*Mynd: Edvard Joensen*

Landsverkfrøðingurin arbeiðir við málinum, sigur borgarstjórin. Ætlanin er at gera pláss til bíðirøðirnar á sama økinum.

Skopun fekk fyri góðum ári síðan nýtt vatnreinsiverk, sum ger, at skopuningar nú altíð hava púra reint vatn.

Vatnmongdin hevur annars verið ein trupulleiki í Skopun eins og aðrastaðani, tá turkur hevur verið. Men nú er tann trupulleikin loystur, sigur borgarstjórin, við at leiðing er løgd í Hálsavøtn.

Tá ringast stendur til við vanligu vatngoymslunum, veður vatn pumpað úr Hálsavøtnum gjøgnum reinsiverkið, áðrenn tað fer oman til Skopunar.

ítróttur
Nr. 23 • leygardagur • 2. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Seinasti dysturin



*Sjálvt um vit hava dømt fleiri av teimum stóru dystunum í ár, so er ein steypafinala altíð nakað serligt, sigur Kári Hansen*

**Finaludysturin hjá kvinnunum verður seinasti dysturin hjá Kára Hansen og Trygva Mortensen hetta kappingarárið**

COCA-COLA FINALA
*Jákup Mørk*

Saknurin í dómarapørum í føroyskum hondbólti hevur verið stórur í ár, og eftir finaludystirnar leygardagin verður hesin gjørdur enn sjónligari.

Hetta verður nevnliga seinasta ferðin hetta kappingarárið, at teir báðir, Kári Hansen og Trygvi Mortensen, fara at døma. Sum ávíkavist leikari og venjari eru teir báðir aktivir í fótbóltskappingini, og tað ber illa til, a fáa hetta at sampakka við dómarayrkið í hondbóltinum.

### Altíð nakað serligt

Hóast hetta, so tykjast teir báðir at gleða seg til seinasta dystin í hesum umfarinum, sum verður leygardagin, tá teir skulu døma kvinnufinalan í Coca-Cola kappingini.

- Eg var eisini annar dómarin til mansfinaluna fyri tveimum árum síðani, so í so máta verður hetta ikki stórt øðrvísi, heldur Kári Hansen, tá vit spyrja hann, um fyrireikingarnar til ein slíkan dyst eru nakað serligt.

- Tað er tó einki at ivast í, at hetta er ein uppgáva, sum vit gleða okkum til. Sjálvt um vit hava dømt fleiri av teimum stóru dystunum í ár, so er ein steypafinala altíð nakað serligt. Nógvir áskoðarar eru í høllini og alt verður sent beinleiðis í bæði út- og sjónvarpi, , so tað er nakað heilt serligt.

### Hava hug at halda fram

Spurdur, um tað ikki eisini er eitt slag av bonus fyri eitt gott kappingarár, at teir nú skulu døma steypafinaluna, sigur Kári, at tað er tað sjálvandi.

- Uttan at meina nakað negativt, so eru kanska ikki so nógv pør at velja ímillum, og tá Hjalmar og Kristian hava eina aðra gularót í altjóða dømingini, so eru vit kanska teir næstu at døma dystin, men sjálvandi er tað eitt herðaklapp.

Nú hann sjálvur nevnir altjóða uppgávurnar hjá Hjalmari og Kristiani, er sjálvandi nærliggjandi at spyrja, hvørt hetta eisini er nakað, sum dómaraparið hjá Tjaldri hevur hugsað um.

- Eg kann ikki siga, at tað er nakað, sum vit ganga og hugsa um. Í løtuni hevur fótbólturin hægri prioritet, men tað kann verða, at støðan verður øðrvísi, tá hesin verður lagdur á hillina.

- Í øllum førum er hugurin at døma góður. Er hann ikki tað, so nyttar tað altso einki at vera við. Vit hava so báðir gjørt av, at vit eisini fara at royna okkum sum dómarar komandi kappingarár, men fyri fyrst ræður so um at seta eitt virðiligt punktum fyri hesum árinum, sigur Kári Hansen at enda.

# Steypadagur

*Á talvuni verður sýnt, hvussu liðini í steypafinaluni hava staðið seg, tá tey hava dystast innanhýsis í hesum kappingarárinum.*

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | VÍF | - | Stjørnan | | | |
| | | | 25 | - | 22 | | | |
| út | mál | | 24 | - | 19 | | mál | út |
| 1 | 13 | (2) | Ioana Rápa | | Simona Dziugyte | (7) | 16 | 1 |
| | 8 | | JacklinDurhuus | | Joan M. Joensen | | 11 | |
| 1 | 8 | | NicoletaRadu | | AndrijanaMilodanovic | (1) | 8 | |
| | 8 | (2) | Sóley Mikkelsen | | Anna KristinaSamson | | 2 | |
| | 6 | | Jórun Ludvig | | Bára Skaale | | 2 | |
| 2 | 4 | | Fríða Marjunardóttir | | Una Olsen | | 1 | |
| 1 | 1 | | Randi Kúrberg | | Beinta Klakstein | | 1 | |
| 2 | 1 | | NikolinaEyðbjørnsdóttir | | Ragna Andreasen | | | 1 |
| 1 | | | Alis Høghamar | | | | | |
| 8 | 49 | (4) | | Í alt | | (8) | 41 | 2 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | StÍF | - | Neistin | | | |
| | | | 24 | - | 25 | | | |
| út | mál | | 34 | - | 34 | | mál | út |
| 1 | 19 | (4) | Costin Dumitrescu | | Hans Áki Dal-Christiansen | (6) | 15 | 2 |
| 1 | 10 | | Artur Johansen | | Jacob Jónsson | (1) | 12 | |
| 1 | 6 | | Leivur Justinussen | | Kári Mortensen | | 10 | 1 |
| | 5 | | Sveinur Justinussen | | Heini Joensen | | 7 | |
| 1 | 5 | | Andre F. Danielsen | | Ári Rouch | | 6 | 1 |
| 1 | 5 | | Bent Djurhuus | | John Petersen | | 4 | 2 |
| | 3 | | Jón Rasmussen | | Ragnar Stakksund | | 2 | |
| 2 | 3 | | Marius Joensen | | Áki Mørk | | 2 | 1 |
| | 2 | | Alexandur Johansen | | Karl Oddmar Rasmussen | | 1 | 1 |
| 7 | 58 | (4) | | Í alt | | (7) | 59 | 8 |

**Finaludystirnir í Coca-Cola kappingini í hondbólti verða leiktir á Hálsi í Havn í dag**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at talan kann gerast um ein hondbóltsdag av teimum heilt stóru, tá steypafinalurnar í hondbólti skulu avgerast.

Ikki minst er tað í hesum høpi hugaligt at staðfesta, at talan er um fýra ymisk feløg, sum eiga finaluumboðini. Hetta átti at veri borganin fyri, at ytru karmarnir kring dystirnar eru av allar besta slag.

Hartil er heldur einki at ivast í, at leikararnir á vøllinum fara at gera sítt ítarsta til, at talan verður um tveir góðar hondbóltsdystir.

Her er jú talan um finaludystir. Dystir, sum ikki geva rúmd fyri mistøkum ella »ringum døgum«. Tað er bara dysturin í dag, sum telur.